**Toll- og Skattstova Føroya**
**Stýrið**

# Fyribilsskráseting 2002

Fyri at fyribilsskatturin kann verða rætt roknaður, mugu tær upplýsingar, ið Toll- og Skattstova Føroya hevur skrásett um B-inntøkur og frádráttir, vera rættar.

**B-inntøkur**
Skatturin í 2002 verður roknaður út frá upplýsingunum um B-inntøku á sjálvuppgávuni 2000.

Um ein B-inntøka er broytt í 2001, verða broytingarnar tiknar við í fyribilsskattaskránna 2002.

Upplýsingar um B-inntøkur eru upplýstar á kontoavritinum, sum verður sent út miðskeiðis í januar 2002.

**Frádráttir**
Neyðugt er hjá øllum, ið ynskja møguligar frádráttir roknaðar við, at upplýsa Toll- og Skattstovuni um, hvørjar frádráttir tey hava.

**DIS-skipanin**
Persónar, sum fara at sigla undir DIS-skipanini, **og persónar, sum eru undir DIS-skipanini, men ikki hava boðað frá hesum**, eiga at boða Toll- og Skattstovuni frá, so upplýsingarnar, ið verða skrásettar fyri 2002, eru rættar.

**Rættingar/fráboðanir**
Oyðublað til at rætta ella skráseta B-inntøku, boða frá frádráttum ella sigling undir DIS-skipanini fáast á Toll- og Skattstovuni, í peningastovnum og á posthúsum.

Oyðublaðið kann eisini heintast á heimasíðuni hjá Toll- og Skattstovuni: www.tollskatt.fo

Allir skattaborgarar eru altíð vælkomnir á økisskrivstovurnar hjá Toll- og Skattstovuni at fáa upplýsingar um, hvørjar skrásetingar um teirra skattaviðurskifti, Toll- og Skattstovan hevur.

*Argir, 10. januar 2002*

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Honda Civic 1,5 I VTEC – 5 hurðar
**Árg.:** 1996
**KM.:** 105.000

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú og kann síggjast hjá tryggingini á Smyrilsvegi, 100 Tórshavn.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Beinleiðis tlf. 345727
Fax. nr. 345607
e-mail: fm@trygging.fo
Fróði Müller
at hitta mánadag til hósdag millum kl. 08.30 til 10.00 og fríggjadag millum kl. 08.30 til 16.00.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Málsviðgeri

Á starvsfólkadeildini, ið umsitur starvsfólka- og lønarviðurskifti, er starv sum málsviðgeri leyst at seta skjótast til ber.

**Starvið**
Málsviðgerin kemur at taka sær av nógvum ymiskum spennandi og avbjóðandi lønar- og starvsfólkamálum.

Tøkniliga er kommunan sera frammalaga við m.a. elektroniskari lønar-, journal- og starvsfólkaskipan. Harumframt er internetið og e-mail samskiftið ein stórur partur av dagliga kunningar og samskiftishátti kommununnar.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava skrivstovu- ella líknandi útbúgving, vera fyrikomandi og hava góð samstarvsevni. Kunnleiki til edv á brúkarastøði er neyðugur.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv sum verður sett skjótast til ber. Setanarviðurskiftini eru sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meira fæst at vita**
um starvið, við at venda sær til Janus Isfeldt, lønarfulltrúa (janus@torshavn.fo) ella Oskar Neshamar, fyristøðufólk (oskar@torshavn.fo), tlf. 315160.

**Umsókn**
við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 28. januar 2002. Merk umsóknina "Starvsfólkadeildin".

Um deildina: Á starvsfólkadeildini starvast í løtuni fýra fólk, umframt tveir næmingar, ið eru knýttir at deildini. Deildin umsitur umleið 600 mánaðarlønt og umleið 300 vikulønt fólk, sum eru lønt eftir 14 ymiskum sáttmálum.

SNARSKIVAN

# Timburmenn til Pihl Føroyar

Søkt verður eftir timburmonnum til arbeiði í Tórshavn, at byrja skjótast til ber.

Áhugaðir biðjast ringja á tlf. 317646 ella til Regin Poulsen á tlf. 215527.

**P/F Pihl & Søn Føroyar**
Postsmoga 149, 110 Tórshavn

# Sethús til leigu

Stór sethús eystanfyri Handilsskúlan til leigu. Húsini eru í trimum hæddum, 5 kømur. Kann leigast til tveir leigarar ella sum kombineraður bústaður/-skrivstova-lagur.

Ávísar treytir fylgja leigumálinum.

**Bill. mrk. 2501**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Starvsfólk

Til sløkkiliðsstøðina hjá Tórshavnar kommunu verður søkt eftir fólki at byrja skjótast til ber.

**Arbeiðsuppgávur**
Høvuðsuppgávan verður at koyra MBF bussin. Av øðrum uppgávum kunnu nevnast viðlíkahald av sløkki- og aðrari útgerð á støðini.

**Førleikakrøv**
Neyðugt er, at tann, ið settur verður, hevur førarabræv til akfar yvir 3.500 kg við átekning til vinnuligan fólkaflutning. Tað er ein fyrimunur at viðkomandi hevur handaliga útbúgving.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og er lønt eftir sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meira fæst at vita**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Peter Seloy, støðleiðara, ella Kartna Jacobsen, varastøðsleiðara, á tlf. 315160

**Umsókn**
við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 28. januar 2002. Merk umsóknina "MBF-førari".

SNARSKIVAN

O2

**Elin Danielsen**
**Útb. fysioterapeutur**
**Dr. Jakobsensgøta 22**
**100 Tórshavn**
**Tlf. 21 44 77**

**ORKU TIL VØDDARNAR - KROPPIN Í JAVNVÁG**
**HITA · MASSAGU · LINNA**

Eingin sáttmáli er við Sjúkrakassan

stephanssons hús

# Kunngerð

Hesar mánadagar verður almennur kommunustýrisfundur á Kommunuskrivstovuni.

| | | |
|---|---|---|
| 21. januar | 18. februar | 18. mars |
| 15. apríl | 13. mai | 24. juni |
| 22. juli | 19. august | 16. september |
| 14. oktober | 11. november | 9. desember |

**Viðareiðis kommuna**

Avloysarastarv sum

# Programmteknikari

Vegna farloyvi er eitt avloysarastarv sum programmteknikari leyst at søkja í Sjónvarpi Føroya frá 1. februar til 15. august 2002.

Arbeiðið umfatar fotografering, redigering og ljóðarbeiði og er skipað í vaktum við skiftandi arbeiðstíðum.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sjónvarp Føroya tel 340400 og spyrja eftir Hans Petur Hansen.

Umsóknir við prógvum, CV og ummælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 21. januar.

svf
**Sjónvarp Føroya**

team85

***Sjónvarp Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. SvF fíggjar sjálvt rakstur sín. Inntøkurnar stava frá hyggjaragjaldi, umframt handilsligum virksemi.***

Røktar- og umlættingarheimið
*Lágargarður*

**Lýsir eftir**

# leiðandi ergoterapeuti

til setan 1. mars 2002 ella skjótast tilber.

**Um starvið:**
Starvið er 35 tímar um vikuna. Løn- og setunarviðurskifti eru sambært sáttmála ímillum Føroyskar ergoterapeutar og Fíggjarmálastýrið.

Leiðandi ergoterapeuturin hevur dagligu leiðsluna í Dagstovninum/Virkisstovuni, og skal saman við starvsfólkunum í økinum veita ergoterapeutisk og aktiverandi tilboð bæði til búfólk og dagstovnsfólk.

Leiðandi ergoterapeuturin virkar annars sambært starvslýsing sum er til taks.

**Førleikakrøv:**
– Áhugi í arbeiði innan eldraøkið
– Leiðsluroyndir
– Skal hava góð samstarvsevni og smidleika
– Skal vera fakliga áhugað og virka fyri menning
– Skal tora avbjóðingar og nýhugsan

Skrivlig umsókn við neyðugum prógvum og møgulig viðmæli skulu sendast til leiðaran á

**Lágargarður**
Stoffalág 84
Boks 1188 · 110 Tórshavn

Meira fæst at vita um starvið við at ringja tlf. 316788.

Umsóknarfreistin er til 28.01.02.

# Títt eygna val!



# ÚTSØLA

*mánadagin 14/1*

Brillustell
*100,-*
*300,-*
*& 500,-*
*- við keyp av gløsum*

Øll onnur brillustell
*- 20%*

Allar sólbrillur
*- 50%*

Allir kikarar
*- 25%*

**optikbúðin**
Bøgøta 4 • Box 92 • FO-110 Tórshavn • Tel 310088 • Fax 310058

# Sandoyar sýslu Javnaðarfelag

## HUGNAKVØLD

Felagið hevur hugnakvøld í Eiriksgarði í Dali leygarkvøldið 19. januar 2002 kl. 19.00 fyri øllum javn aðaráhugaðum í Sandoyar valdømi.

Tey, sum ynskja at luttaka, biðjast siga frá hjá nevndini á einum av nevndum máltráðum: 361115 - 361093 - 361334 - 361404 - 361206 - 361452 - 361139, helst áðrenn 15. januar.

**Sandoyar sýslu Javnaðarfelag**

# Keypssamtøkan í Hoyvík

søkir eftir tveimum fólkum til kassaarbeiði, seinnapart og annanhvønn leygardag, at byrja 1. februar ella eftir avtalu.

Løn samb. S&K.

Meira fæst at vita um setanartreytir hjá Bent Lundsgaard, tlf. 314149.

Skrivlig umsókn skal sendast til

**FK Hoyvík**
Box 349
188 Hoyvík
Att.: Bent Lundsgaard